Harley Davidson VRSCR Street Rod:

# Harley til evropearar



*Ein av Harley fjepparunum Sofus Hansen sigur, at tað ræður um at investera rætt fyrstu ferð, so ein sleppur undan at vera ein "Wannabe". Myndatema av súkkluni er at síggja á www.portal.fo*

**Harley Davidson hava í samstarvi við týsku Porsche-bilverksmiðjuna framleitt nýggju V-Rod seriuna, ið er ein rættuliga sermerkt motorsúkkla. HD umboðið í Føroyum hevur fingið eina av teimum allarfyrstu av 2006 árganginum**

## Harley Davidson VRSCR Street Rod

| | |
|---|---|
| Motorurin | Vatnkøldur Revolution V-Twin motorur 1130 cc 2 syl. 60 stig 120 hk (á bakhjólunum) ESFPI Elektroniskari innspræning DOHC |
| Toppferð | 225 km/t (5-gir / tannreim) |
| Snúningsmoment | 108 Nm v.7.000 o/min |
| Dekkstødd | 120/70 ZR 19 (framman) 180/55 ZR 18 (aftan) Bremo bremsir 300 mm dupultar skivur framman |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 243,5 cm |
| Aksilfrástøða | 170,0 cm |
| Seturhædd | 76,0 cm |
| Eginvekt | 292 kg |
| Prísur | kr. 219.442,- |
| Søluumboð | HD.fo (Harley Davidson í Føroyum) Jónas Broncksgøta 33 FO-100 Tórshavn Tel. 210405 www.HD.fo |

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í kappingini um evropeisku motorsúkklu-kundarnar eru Harley Davidson komnir á marknaðin við eini nýggjari og meira sermerktari útgávu av klassisku V-Rod modellunum frá 2002. Hendan er gjørd í samstarvi við týsku Porsche bilverksmiðjuna. Rætta navnið á súkkluni er Harley Davidson VRSCR Street Rod.

Talan er enn um eina motorsúkklu við tveimum sylindarum og V-motori, sum nú hevur fingið enn meira hestakreftir og størri snúningsmoment. V-motorurin, ið er 2. syl. við 1130 cc og 120 hk, gevur súkkluni ta kraftina, sum skal til fyri at kunna nýta koyrieginleikarnar fult út. Sagt verður at nýggju Street Rod: "Is born on the track, raised on the street"

Fyri at betra um koyrieginleikarnar og komfortin, hevur V-Rod nú fingið nýggjan "upside-down" forgaffil og ymiskar aðrar justeringar, sum saman við styttri aksilfrástøðu geva lættari stýring og munandi betri koyrieginleikar í svingum, ið nú kunnu takast við einum hallvinkli heilt niður til 40 stig.

Umboð fyri Harley Davidson í Føroyum er fyritøkan "HD-fo, ið umboðar donsku Harley Davidson fyritøkuna CAPS-HD. Fyritøkan skipar eisini fyri viðlíkahaldi, umvælingum, uppbygging av customsúkklum og útleigan av Harley motorsúkklum. Umframt sjálvar súkklurnar útvegar fyritøkan Harley Davidson klæðir í besta kvaliteti til vaksin og børn. HD.fo hevur nú fingið serframleitt eina "super feita" føroyska Harley T-shirt. Hetta er gjørt eftir at stórur eftirspurningur hevur verið eftir hesum T-shirtum, serliga frá útlendskum ferðafólkum, sum vitja her hvørt ár. Eisini skipar fyritøkan fyri motorsúkklutúrum, bæði í Føroyum og uttanlanda.

Eitt av endamálunum hjá HD-fo er at geva so nógvum fólki sum gjørligt møguleikan at ogna sær eina Harley Davidson. HD.fo lýsa t.d. við fólk kunnu gera dreymar sínar til veruleika. Teir bjóða eitt breitt úrval av bæði nýggjum og gomlum HD motorsúkklum umframt service frá dugnaligum mekanikarum. Somuleiðis hava teir alskyns HD vørulutir bæði til verandi og komandi motorsúkklufjepparar".

Heimskenda amerikanska Harley Davidson motorsúkkluverksmiðjan, ið er yvir 100 ára gomul, varð stovnað av Bill Harley og Arthur Davidson í Milwaukee í Wisconsin í USA í 1903. Harley Davidson vórðu millum tær fyrstu hópframleiddu motorsúkklurnar í heiminum. Við atliti til tann stóra eftirspurningin eftir Harley Davidson motorsúkklum, bæði í USA og Evropa, hevur verksmiðjan verið noydd til at hækka framleiðsluna frá 317.000 til yvir 400.000 eindir árliga.

Harley Davidson owner group (HOG) er heimsins størsti motorsúkklufelagsskapur við meira enn 900.000 limum um allan heim. Limir í hesum felagsskapi koma úr øllum samfelagsstættum. Vanligt er at Harley Davidson felagsskapir gera nakað fyri børn. Her hjá okkum hava teir m.a. savnað pening inn til Barnaheimið í Havn.

Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.HD.fo



*V-motorurin við 1130 cc og 120 hk gevur súkkluni ta kraftina, sum skal til fyri at kunna nýta koyrieginleikarnar fult út*